# Sjónvarps-kvinnur við pensli og máling

Tær eru starvsfelagar í Sjónvarpi Føroya og tær hava sama frítíðarítriv. Komandi viku verða verturin og fotografurin, Eir í Ólavsstovu og Bjørg Mohr Andresen, at síggja á felags listaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði



*Eir við myndini "Blómutyssi", sum fyrst og fremst skal gera fólk glað*



*Eir: "Várgardinur"*



*Eir: "Jazzur"*

LISTAFRAMSÝNING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Uttan iva hava fólk, sum arbeiða við sjónvarpi, eitt serligt eyga fyri slíkum, sum kann skapa áhugaverdar myndir. Ella er tað kanska púra av tilvild, at tær báðar Eir í Ólavsstovu og Bjørg Mohr Andersen, sum dagliga eru starvsfelagar í Sjónvarpi Føroya, báðar fáasta við at mála og hava valt at hava eina listaframsýning - saman? Bæði og. Serliga eygað fyri litum og kompositiónum letur seg ikki fjala í myndunum, men heitið á framsýningini "Títt og mítt" er ein rættiliga avgjørd tilsiping til, at nógv veldts um eygað, ið sær ...

## Tær reyðu og hinar

Eir kenna vit frá ymsum sendingum og beint nú sum vert í Mentanartíðindum, har Bjørg er ein av teimum, hinumegin myndatólið. Annars vóru tað eisini tær báðar, sum gjørdu "Hátrýst", sum var eitt slag av ferðavinnutátti í Degi og Viku síðsta summar. Fá munnu vita, at tær eisini hava sama frítíðarítriv, men hví hesa felags framsýningina, sum var at síggja í Smiðjuni herfyri?

- Vit høvdu báðar brúk fyri einum høli og hildu, at hetta kundi verið stuttligt. Men hetta er also ikki ein felags listarlig verkætlan, tí vit hava ikki vitað, hvat hin fór at koma við. Tað sóðu vit ikki, fyrr enn kvøldið fyri ferniseringina, tá vit byrjaðu at hanga myndirnar upp, sigur Bjørg.

Tann avbjóðingin gjørdist uttan iva størri enn væntað, tí myndirnar hjá teimum báðum fáa illa verðið meir ymiskar.

- Bjørg eigur tær reyðu, og eg eigi hinar, so tað er vist rættiliga týðiligt, at Bjørg er tann meir stílfulla av okkum báðum, flennir Eir og greiðir frá, hvussu tær leingi royndu seg fram fyri at skapa eina javnvág í framsýningina. Úrslitið gjørdist ein hugtakandi samanseting av teimum reyðu og hinum, teimum stóru og smáu, hvør um aðra í eini harmoniskari heild, har tað kortini líkasum prutlar undir lokinum og í krókunum.

## Skurr við skapi

Myndirnar hjá Eir eru óvanliga litríkar og sum heild glaðar, onkuntíð eitt sindur teknifilmskendar.

Tær tríggjar myndirnar "Várgardinur" fekk hon íblástur til av storesgardinunum, sum hingu og flákraðu í einum vindeyga, hon gekk framvið, ein av fyrstu várdøgunum. Rørslurnar í gardinunum flyta seg dandandi frá eini mynd til ta næstu, sum vóru myndirnar eisini smá vindeygu.

- Tað kendist sum, at várið kom við vindinum í gardinunum, og tað fekk eg hug at endurskapa uppá onkran máta, sigur Eir og leggur afturat, at hennara myndir sjáldan eru so ætlaðar, sum júst hesar tríggjar vóru frá byrjan.

Myndina "Jazzur" hevur Eir til